RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

betri




# GONGUROYND

## Góðu foreldur

Vit arbeiða í løtuni við ferðslu í flokkinum og fara skjótt at taka Gonguroyndina, har barn títt skal ein túr út í ferðsluna. Umráðandi er, at foreldur stuðla barninum og fyrireika tað til uppgávuna.

### Leikluturin hjá foreldrum

Tú hevur stóran týdning fyri ferðslutrygdina hjá barninum. Tað besta, tú kanst gera, er at fara út at ganga við barninum. Tess meira tit venja saman, tess skjótari mennist barnið og lærir at bera seg rætt at í ferðsluni. Á henda hátt búnast barnið til at kunna fara einsamalt til gongu. Minst til, at barnið hevur tørv á tær og speglar sær í tínum atburði. Gev tær fær um at binda tykkum í trygdarbeltið og brúka súkkluhjálm, tá tit súkkla.

Les meira um, hvat tú kanst vænta av einum 6-7 ára gomlum barni og fá góð ráð til ferðsluvenjingar á **www.rff.fo**

### Um Gonguroyndina og ferðslu á skúlanum

Gonguroyndin er undirvísingartilfar frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Næmingarnir hitta Alva og Riu, sum fara ein gongutúr og eru fyri ymsum avbjóðingum í ferðsluni. Næmingar og lærari fáa á henda hátt høvi til at tosa saman um reglur og um, hvussu tey bera seg rætt at í ferðsluni. Eisini er umráðandi, at næmingarnir sleppa at royna seg til gongu í ferðsluni saman við foreldrunum.

Sum liður í hesum fara vit at taka Gonguroyndina, har næmingarnir tveir og tveir ella møguliga sjálvir skulu royna seg í eitt nú at fara tvørtur um ein veg á rættan hátt og so framvegis. **Tá Gonguroyndin er av, fáa allir næmingarnir skreytblað.**

Vinarliga

Lærarar í 1. flokki og Ráðið fyri Ferðslutrygd

**GG:** Við Gonguroyndini er barnið væl ávegis at verða trygt gongufólk í ferðsluni. Tó eru tað altíð foreldrini, sum mugu meta um, nær barnið klárar seg einsamalt í ferðsluni.

## Heimauppgáva

Vit heita á teg um at gera eina venjing saman við barninum, áðrenn vit fara út at taka Gonguroyndina:

**Gakk ein túr við barninum** – best er at velja sær eina leið, sum tit kenna væl. Skúlaleiðin er sjálvsagt eitt eyðvitað val. Er leiðin ov long, kunnu tit taka ein ávísan tein burturúr ella eina heilt aðra leið, sum tit plaga at ganga. Á leiðini er týdningarmikið at tosa um tað, tit síggja og koma framá í ferðsluni. Roynið flest møguligar av venjingunum niðanfyri – sjálvsagt lagað eftir tykkara gerandisdegi og nærumhvørvi.

**Sí heimauppgávur á næstu síðu.**

Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

Heimauppgáva




## Gakk ein túr saman við barninum

- ☐ **Far tvørtur um vegin**
  Hvussu kunnar tú teg allar vegir, skalt tú til dømis tvørtur um ein T-krossveg?
- ☐ Hvussu tryggjar tú tær, at tú fært hugt nóg væl fram fyri teg, um til dømis vegurin sneiðir ella bilar standa parkeraðir?
- ☐ **Far tvørturum á einum gonguteigi**
  Nær kanst tú fara tvørturum, og hvørjum skalt tú ansa eftir?
- ☐ **Ferðsluljós**
  Hvussu kunnar tú teg allar vegir?
- ☐ **Bussteðgistað**
  Hvussu fert tú inn í ella úr einum bussi, og hvussu fert tú tvørtur um vegin, tá ið tú ert farin úr bussinum?
- ☐ **Gakk bæði á vegi við gongubreyt og ongari um til ber**
  Hvar skalt tú ganga, um eingin gongubreyt er?

## Tosið eisini um

- Hvar tit **ikki** skulu ganga – til dømis á stórum vegi við tungari ferðslu, har pláss ikki er fyri fólki til gongu.
- Hvussu ansa tit eftir bilum, sum til dømis bakka út úr eini innkoyring ella á einum parkeringsøki við skúlan?

## Finn eina trygga skúlaleið

Skjótasta skúlaleiðin er ikki altíð tryggasta leiðin. Ein trygg skúlaleið er leið, har:

- tit so sjaldan sum til ber verða noydd at fara tvørtur um ein veg
- tit sum mest ganga eftir gøtum við ongari ferðslu
- tit ganga eftir gonguteigi, um neyðugt er at fara tvørtur um veg
- tit hava gott sýni, um tit til dømis skulu tvørtur um ein veg

Tilfar brúkt við loyvi frá: RÅDET FOR SIKKER TRAFIK